

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 03 - 2013

# Brek á Shefa nervar ikki oljufeløgini

Brek á Shefa2 kaðalinum millum Orknoyggjar og Skotland, sum helst stavar frá fiskireiðskapi, fer ikki at nerva sambandið, sum FT Net letur til oljufeløgini vestan fyri Hetland. Hetta upplýsir Páll Vesturbú fyri Oljan.fo. Shetland Times skrivaði hósdagin, at breiðbandið í Hetlandi og Orknoyggjunum riggaði ikki vegna streymslit á Shefa-kaðalinum. Hetta hevði við sær, at fyritøkur í oyggjunum mistu sambandið við síni viðskiftafólk. Tey, sum hava havt trupulleikar, hava fingið brekið rættað við, at veitarin hevur lagt trafikkin um til at koyra yvir alternativ radiosambond, sum enn eru tilsett, ella hava lagt trafikkin um til at koyra norðureftir yvir Shefa til Føroyar, og síðani við Farice-kaðalinum úr Føroyum til Bretlands. Páll Vesturbú sigur, at trupulleikin er á SHEFA-2 millum Orknoyggjar og Skotland. Órógvið í Hetlandi kemur av, at veitarnir har ikki vóru nóg væl fyrireikaðir upp á, at eitt brek hendi á SHEFA-2 á leiðini suðureftir, og tað tekur tí longri tíð at gera tillagingar í skipanum, soleiðis at trafikkurin fer gjøgnum alternativa sambandið yvir SHEFA-2 norðureftir yvir Føroyar. Hettar tekur helst nakrar dagar hjá teimum at seta upp. Oljufeløgini, sum Føroya Tele hevur avtalur við, fáa trafikkin fluttan yvir Føroyar, tá ið sambandið suðureftir hevur ein trupulleika, so tey eiga ikki at hava merkt stórvegis til brekið. FT-Net roknar við, at skaðin stendst av fiskireiðskapi. Væntandi er brekið rættað innan nakrar dagar.